# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 29.11.2024 |
| Mál nr.: | 24/27259-2 |
| Málsviðgjørt: | IN |
| Ummælistíð: | Skrivið 02.12.2024/16.12.2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**prístalsviðgerð av tilskoti til tilskotsheimilaðan heilivág**

Við heimild í § 18, stk. 6 í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heislutrygdarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 29. mai 2024, verður ásett:

**§ 1.** Fyri persónar í aldrinum 18 ár til pensjónsaldur verður onki tilskot veitt, um útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár eru undir 970 kr.

**§ 2.** Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 970 kr., er tilskotið:
1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 970 kr. og upp til 1.579 kr.
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.579 kr. og upp til 3.157 kr.
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 3.157 kr. og upp til 6.315 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 6.315 kr.

**§ 3.** Fyri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar verður onki tilskot veitt, um útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár eru undir 970 kr.

**§ 4.** Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 970 kr., er tilskotið:
1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 970 kr. og upp til 1.980 kr.
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.980 kr. og upp til 2.508 kr.
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.508 kr. og upp til 2.808 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 2.808 kr.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2025.

Heilsumálaráðið, 29. november 2024

**Súsanna Bertholdsen**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Skjal 1**

**Heitið á skjalinum**